## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og um kvøldið regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind ella skrið av eystri. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt regn- ella kavaælið. Hitin millum 1 og 5 stig.

# »Hugaheimurin«, forvitnislig framsýning í Norðurlandahúsinum

**Í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá Havnar Fimleikafelag 9. des 2009, verður spennandi og flott framsýning við felagsins fremstu fimleikarum í Norðurlandahúsinum 28. og 29. november**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

- Her hevur tú høvið at síggja fremstu fimleikararnar hjá felagnum innan rútmu og amboð og øðrum útvaldum fimleikarum, vísa ymiskar spennandi, hugtakandi og flottar rørslur, sum lýsa evni, sum okkum menniskju rúma í hugaheiminum, og saman við alskyns amboðum, ljósi, ljóði og pallsmíði, fara tey at røkka eini hægri eind, sigur Havnar Fimleikafelag í tíðindaskrivi.

Tað eru lesandi útisetarnir Eyð Strøm og Annika Abrahamsen, sum báðar búgva í Keypmannahavn, sum standa á odda fyri ”Hugaheiminum”, sum er ein gáva til Havnar Fimleikafelag á stóra degnum. Eyð og Annika hava slitið sínar barnaskógvar í Havnar Fimleikafelag og hava tær seinastu árini arbeitt nógv við kappingarliðunum hjá felagnum og vunnið mangt eitt meistaraheiti. Í heyst hava tær javnan verið her heima og vant fimleikararnar og Daisy Saxov, sum hevur verið í felagnum í mong ár, hevur staðið fyri samskipanini.

Tak tær tíð til at njóta eina løtu í okkara hugaheimi, og loyv sinninum at rúma hugaheiminum. Framsýningin, er ætlað øllum, eisini teimum, sum einki tilknýti hava ella hava havt til Havnar Fimleikafelag, so ogna tær atgongumeki nú!

Sýningarnar eru bert 3 í tali og varða tær ein góðan tíma hvør. Sýningarnar eru leygardag 28. november 2009, kl 16.00 og 19.00 og sunnudagin 29. november 2009, kl 16.00. Atgongumerki eru til keyps á www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum, Kunningarstovuni í Havn, Runavík, Fuglafirði og Klaksvík.





**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | 5 |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 18 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 10 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 958 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið skant norðan fyri Føroyar fer norðureftir.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið skamt sunnan fyri Ísland fer framvegis spakuliga norðureftir og grynnist. Brúgvalagið yvir Skotlandi fer í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/11 kl. 06[00] – 18/11 06[00]. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 17/11 kl. 06[00] – 18/11 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 61 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 7. november | Mánin næstur jørðini |
| 16. november | Tendring |
| 22. november | Mánin longst frá jørðini |
| 24. november | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19.nov | 08:11 | 20:37 | 07:11 | 19:37 | 07:26 | 19:52 | 10:11 | 22:37 | 11:11 | 23:37 | 06:26 | 18:52 | 05:26 | 17:52 | 08:26 | 20:52 | 09:26 | 21:52 | 07:56 | 20:22 | 09:11 | 21:37 |
| 20.nov | 09:02 | 21:27 | 08:02 | 20:27 | 08:17 | 20:42 | 11:02 | 23:27 | - | 12:02 | 07:17 | 19:42 | 06:17 | 18:42 | 09:17 | 21:42 | 10:17 | 22:42 | 08:47 | 21:12 | 10:02 | 22:27 |
| 21.nov | 09:50 | 22:14 | 08:50 | 21:14 | 09:05 | 21:29 | 11:50 | - | 00:27 | 12:50 | 08:05 | 20:29 | 07:05 | 19:29 | 10:05 | 22:29 | 11:05 | 23:29 | 09:35 | 21:59 | 10:50 | 23:14 |
| 22.nov | 10:36 | 22:58 | 09:36 | 21:58 | 09:51 | 22:13 | 00:14 | 12:36 | 01:14 | 13:36 | 08:51 | 21:13 | 07:51 | 20:13 | 10:51 | 23:13 | 11:51 | - | 10:21 | 22:43 | 11:36 | 23:58 |
| 23.nov | 11:17 | 23:36 | 10:17 | 22:36 | 10:32 | 22:51 | 00:58 | 13:17 | 01:58 | 14:17 | 09:32 | 21:51 | 08:32 | 20:51 | 11:32 | 23:51 | 00:13 | 12:32 | 11:02 | 23:21 | - | 12:17 |